# Grót rullar í Klaksvíkini og Havnini hetta vikuskiftið

**Tíðindaskriv**

Tónleikasamtakið Grót heldur áfram við konsertunum kring landið. Hetta vikuskiftið vera konsertir bæði í Klaksvík og í Havn. Tríggir bólkar, Clickhaze, Flux og Diatribes fara á pallin.

Í Klaksvík spæla Clickhaze og Flux, og í Havn spæla Flux og Diatribes.

Allir hesir bólkarnir eru sera virknir á tónleikaliga økinum í løtuni.

Clickhaze dríva á at venja til tey fara í Lundgaard studio at taka upp hin 03. september. Talan er um eina viku í studio, og Clickhaze vóna at fáa minst try til fyra løg í kassan, alt eftir hvussu væl alt gongur. Upptøkurnar í Lundgaard studio eru partur av vinninginum frá Prix Føroyar finaluni 2001, ið Clickhaze vunnu.

Flux fara mikudagin 29. august til Grønlands á konsertferð. Flux hava síðani Prix Føroyar útviklað seg rættiliga nógv. Fyrst og fremst er guitarsnillingurin Rasmus Rasmussen komin vid í bólkin. Hetta hoyrist aftur tónleikinum, og nýggja samstarvið millum Rasmus og hinar í Flux riggar sera væl. Flux hava gjørt hópin av nyggjum tilfari síðani Prix finaluna og eftir hesar bádar konsertirnar eru teir also á veg til Grønlands.

Diatribes vóru við í grót harða undanumfarinum í Prix-kappingini í Vági, tá Clickhaze vunnu og Tyr gjørdust nummar tvey. Hóast tað ikki eydnaðist at koma í finaluna, hava Diatribes tó ikki lagt seg afturá at letast. Teir hava vant nógv og eru nú í gongd við at gera eina fløgu, sum verður upptikin í Føroyum.

Konsertirnar vera í Atlantis í Klaksvík fríggjakvøldið kl. 22 og í hølunum hjá Grímu í Havn (Gamla Meiarínum), leygarkvøldið kl. 22.00.




Bornholms Forskningscenter:

# -Føroyar eru eitt ógvuliga lítið ferðamannaland



*Anders Sørensen frá Bornholms Forskningscenter, her avmyndaður saman við Biritu Nolsø frá Ferðaráðnum, heldur ikki ferðavinnuna í Føroyum vera nakað serliga stóra.*

**Hóast talið av ferðafólki, sum koma til Føroya, er vaksandi, so skulu Føroyar ikki meta seg sum nakran risa í ferðavinnu høpi. Hetta sigur Anders Sørensen frá Bornholms Forskningscenter, ið hevur gjørt eina frágreiðing um føroysku ferðavinnuna**

FERÐAVINNA

*Heri á Rógvi*

Hesi seinastu tvey árini hevur Bornholms Forskningscenter kannað føroysku ferðavinnuna. Úrslitið av kanningunum eru tvær fylgjandi frágreiðingar. Talan er um sokallaðar »Steam« rapportir. Hetta slagið av frágreiðinum verður nýtt í nøkrum øðrum londum eisini. Hini londini, har »Steam« frágreiðing er gjørd, eru m.a. Suður Afrika, Skotland og England. Hetta slagið av kanningum er rættiliga sermerkt, og byggir hetta á formlar, sum kanska ikki ein og hvør dugur at skilja. Í Føroyum hava Petur Zachariassen, Jógvan Mørkøre og Bjarni Olsen mett um frágreiðingin er eftirfarandi. Tað var Ferðaráð Føroya, sum heitti á hesar tríggjar at hyggja nærri at frágreiðingini, tá hesir verða mettar sum serkønir.

Anders Sørensen, sum umboðaði Bornholms Forskningscenter á einari verkstovu í vikuni, sigur, at teir í einari slíkari kanning royna at hava lokala servitan við í kanningararbeiðinum, og tað hava teir eisini gjørt hesuferð.

Henda seinasta »Steam« frágreiðingin er gjørd útfrá kanningum og hagtølum í tíðarskeiðinum mai 2000 til apríl 2001. Samanborið verður í seinastu frágreiðingini við hina undarfarnu frágreiðingina, sum varð gjørd fyri tíðarskeiðið mai 1999 til apríl 2000.

Høvuðstølini vísa eisini eitt rák, sum sigur okkum so mikið, at fleiri fólk leggja leiðina til Føroya. Talið av ferðandi til Føroya er, sambært frágreiðingini, voksið við 21 %, og nýtslan er voksin við 12%.

Hóast positivu gongdina, so heldur Anders Sørensen framvegis, at Føroyar eru at meta sum eitt lítið ferðavinnuland. Hann sammetur Føroyar við Bornholm, sum hevur fleiri enn 500.000 ferðandi um árið. Greitt er sjálvandi, at Bornholm hevur ávísur fyrimunir í mun til Føroyar, men Anders Sørensen heldur framvegis, at Føroyar eru lítið ferðamannaland.

## Fylgja við

Henda seinasta frágreiðingin er sum áður nevnt skrivað útfrá tíðarskeiðinum mai 2000 til apríl 2001. Anders Sørensen sigur, at talan er um eina sokallaða kvantitativa og representativa kanning, sum fyrst og fremst vísir á, hvussu rákið er.

-Tað er torført at koma við teimum hundrað prosent røttu tølunum, tá vit ikki spyrja hvønn einasta ferðandi, um hvør hann ella hon er, ella hvat hann ella hon nýtir av pengum.

Frágreiðingin byggir á hagtøl og kanningararbeiði. Kanningararbeiði er serliga gjørt við at nýta spurnarbløð. Eisini eru hagøtl savanaði ymstastaðni frá.

- Alt í alt eigur henda frágreiðingin at vísa eina mynd, hvussu støðan er hjá ferðavinnuni í Føroyum. Somuleiðis eigur frágreiðingin at siga, hvussu rákið er, sigur Anders Sørensen, sum er útbúgvin fólkalívsfrøðingur.

## Beinleiðis og óbenleiðis

À tí fíggjarligu síðuni ger henda seinasta kanningin upp, hvat hesi hesi góðu ferðafólk leggja eftir seg, t.e nýtslan hjá teimum, sum í frágreiðingini verður rópt beinleiðis nýtsla. Somuleiðis verður vist á ta sokallaðu óbeinleiðis nýtsluna, sum hesi somu ferðandi hava.

Beinleiðis nýtslan byggir eisini á kanningar við spurnarbløðum og somuleiðis eisini hagtøl.

Hin faktorurin, nevniliga tann óbeinleiðis nýtslan, er heldur torførari at máta, men hetta byggir í høvuðsheitum á tær íløgur og tann kostna, sum verður knýttur at árinunum av ferðavinnuni. Hetta snýr seg eitt nú um byggingar- og umvælingararbeiði, sum kann verða sett í sambandi við hesi somu ferðandi.

Bæði tann beinleiðis og óbeinleiðis nýtslan eru voksnar ávíkavíst 11 og 12 prosent. Samlaða effektin er, sambært frágreiðingini, 183 mío kr.

Tað skal viðmerkjast í hesum sambandi, at inntøkur frá ferðaseðlum ikki eru við í tølunum yvir fíggjarligu effektina.

Fleiri vilja vera við, at hetta talið, 183 mío, eigur at verandi munandi hægri. Anders Sørensen avvísir heldur ikki, at tølini kanska eru hægri, men frágreiðingin er bygd á rættiliga »konservativ tøl«, og tað er fyrst og fremst rákið, sum vit eiga at leggja okkum eftir, sigur Anders Sørensen.

## Útisetar

Hyggja vit nærri eftir teimum, sum ferðast til Føroya, so sæst, at talið er hækkað við 9% í mun til seinastu frágreiðingina hjá. Frá mai 2000 til apríl 2001 hava 40.481 vitja oyggjarnar. Broytingin skyldast, sambært Anders Sørensen, mestir einari øking av sokallaðum feriugestum. À øllum økjum uttan tí, sum verður rópt »Ikke-serviceret indkvartering« er ferðafólkatalið hækkað.

Tað, sum kanska er eitt sindur misvísandi, er, at av teimum gott 41.000 ferðandi, so eru 17.382 av teimum ferðandi, ið verða bólkaði undir »ophold og familie og venner«. Hetta tal er sett at vera konstant fyri hesar báðar seinstu frágreiðingarnar. Bróðurparturin av hesum fólkunum eru mestir útisetar, har kanska størsit parturin er lesandi og føroyingar, sum starvast í øðrum londum.



# Skipaeftirlitið verður í Vágum

**Føroyingar skulu yvirtaka danska skipaeftirlitið í Føroyum 1. januar komandi ár. Jørgen Niclassen, landsstýrismaður, hevur gjørt av, at nýggi stovnurin skal vera í Vágum. Fiskimálastýrið fer í næstum at søkja eftir stjóra til nýggja Skipaeftirlitið**

YVIRTØKA

*John Johannessen*

Politisk semja er fingin í lag við danir um at miðja eftir, at Skipaeftirlitið verður yvirtikið 1. januar komandi ár, eins og løgtingið hevur samtykt.

Og við grundarlag í hesum, hevur Jørgen Niclassen, landsstýrismaður í fiski- og sjóvinnumálum, gjørt av, at nýggi føroyski stovnurin skal vera í Vágum.

Tríggir samráðingarfundir hava verið við danskar myndugleikar um yvirtøkuna av Skipaeftirlitinum, og landsstýrismaðurin metir samráðingarnar vera komnar so mikið langt, at hann í næstum fer at søkja eftir stjóra til føroyska Skipaeftirlitið. Stjórin skal longu setast 1. oktober.



*Vágoyggin er einasta oyggin, sum ongan almennan stovn hevur fingið tey seinastu árini. Tí hevur Jørgen Niclassen gjørt av, at føroyska Skipaeftirlitið skal vera í Vágum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Liður í økismenning

Jørgen Niclassen, landsstýrismaður, sigur, at avgerðin um at leggja nýggja Skipaeftirlitið í Vágum er liður í skipaða økismenningarpolitikkinum hjá landsstýrinum.

Landsstýrismaðurin vísir á, at trygdarskeiðið fyri sjómenn er í Klaksvík, at Almanna- og Heisluskúlin er lagdur í Suðuroynni, at innkrevjingin til Barnsburðargrunnin er løgd í Suðuroynni, at skattainnkrevjingin fyri oljuvinnuna skal vera í Suðuroynni og í Norðoyggjum, at MRCC-støðin skal vera í Havn, at Stuðulsstovnurin skal vera í Eysturoynni, at Lista- og Tónleikaskúli skal vera á Sandoynni og at umsitingin í sambandi við frítíðarløn skal vera í Suðuroynni.

Eftir at hava sitið og spælt sær við at seta hesar eindir sum matadorhús á eitt Føroyakort, er landsstýrismaðurin komin til tað niðurstøðu, at Vágoyggin er tann einasta, sum stendur ber, og tí heldur hann tað vera heilt náttúrligt at leggja Skipaeftirlitið har.

Men valár er, og Jørgen Niclassen er sjálvur úr Vágum. Tí er hugsandi, at avgerðin hjá landsstýrismanninum er valagn.

Hesum vísir Jørgen Niclassen tó aftur.

– Tað er torført at gera av, hvar ein slíkur stovnur skal vera. Tí alt hevur verið lagt kring Havnina fyrr. Vit kundu gjørt av at lagt Skipaeftirlitið onkra aðrastaðni. Men so hevði Vágoyggin staðið eftir, sum tann einasta oyggin, ið ongan stovn fekk.

– Eg haldi, at vit við at leggja Skipaeftirlitið í Vágum prógvað, at landsstýrið hevur arbeitt fyri økismenning kring alt landið, sigur Jørgen Niclassen.

## Bert praktiskir trupulleikar

Tað krevur nógv fyrireikingararbeiði at stápa eitt føroyskt Skipaeftirlit upp á beinini, tí nógvir lógartekniskir spurningar eru, sum greiða skal fáast á, eins og samstarvsavtalur skulu gerast við danir.

Men politisk semja er fingin í lag við danir, um at teir skulu hjálpa at, tað teir kunnu, so vit fáa eitt føroykst Skipaeftirlit. Og tær samráðingarnar, sum nú fara fram, eru millum embætisfólk og snúgva seg um tekniskar spurningar.

Landsstýrismaðurin í fiskivinnumálum hevur ikki hug neyvt at útgreina og seta vekt á, hvørjir eru teir størstu praktisku og lógartekniskju spurningarnir, ið skulu útgreinast. Men hann ger greitt, at arbeitt verður við fullum seglum fyri at hava alt klárt, so Skipaeftirlitið kann yvirtakast 1. januar 2002, eins og løgtingið hevur samtykt.

Tó torir Jørgen Niclassen ikki at lova, at Skipaeftirlitið verður yvirtikið júst 1. januar.

– Vit arbeiða sum sagt við fullum seglum. Men stutt tíð er eftir til 1. januar, og vit skulu finna høli, fáa starvsfólkaviðurskiftini upp á pláss og so framvegis. So eg tori einki at lova, sigur Jørgen Niclassen.

# Trygd á altjóða støði



Í sambandi við ætlaðu yvirtøkuna av Skipaeftirlitinum hava summið ivast í, um slakað fer at verða í minstukrøvunum.

Men Jørgen Niclassen vissar um, at trygdin fer at verða sett í hásæti við einum føroyskum skipaeftirliti.

– Krøvini fara tó helst at verða lagað eitt sindur til føroysk viðurskifti. Danska Skipaeftirlitið setir strong krøv til ferjur og farmaskip, meðan tað setur linari krøv til smábátar, meðan krøvini í Íslandi eru hørð til smábátar. Hetta kemur av, at danir hava so nógvar ferjur og farmaskip og fáar smábátar. Í Føroyum hava vit nógvar smábátar, og fer eitt føroyskt eftirlit tí helst at seta strangari krøv til smábátar, enn tað verandi danska, greiðir Jørgen Niclassen frá.

Í sambandi við trygdina ætlar Jørgen Niclassen, at Føroyar skulu fáa atlimaskap í IMO, ið er altjóða stovnurin, ið setur minstukrøvini fyri trygd umborð á skipum. Danir skulu hava fund við IMO í London í oktober, og har vera føroyingar við, fyri at kanna møguleikan fyri atlimaskapi.

Í løtuni eru tað bert tvey lond, ið hava fingið atlimaskap í IMO. Tey eru Hong Kong og Makao. Men Jørgen Niclassen vónar kortini, at tað fer at bera til hjá føroyingum. Atlimaskapur í IMO merkir, at vit fáa øll rættindi og allar skyldur, sum limalondini hava, men at vit ikki fáa atkvøðurætt.

